Føroyar og oljan

Á fundi við studentaskúlanæmingar í Suðuroy segði Vilhelm Johannesen, tingmaður, m.a. um »Føroyar og oljuna«:

Vilhelm Johannesen, Helena Dam á Neystabø, Heine O Heinesen og Bjørn á Heygum vórðu bodnir á fund við studentaskúlanæmingum í Suðuroy at siga sína hugsan um Føroyar og oljuna

»Eg skal fyrst nýta høvið til at takka tykkum fyri, at javnaðarflokkurin varð boðin at senda eitt umboð við á hendan fundin, og síðani skal eg takka tykkum fyri, at tit hava átikið tykkum at viðgera ein so álvarsaman og týdningarmiklan spurning, sum oljuvinnan kann fara at verða fyri føroyska samfelagið nú og í framtíðini.

At tit júst hava valt at heita á meg um at umboða javnaðarflokkin her í dag, kemst helst av, at eg fyri nøkrum vikum síðani hevði eina grein í Sosialinum um hendan spurning. Í nevndu grein vísti eg á vandan fyri, at vit føroyingar fara at gløða í oljuni, um vit ikki nú beinan vegin binda um heilan fingur, við at bera so í bandi, at oljupeningurin í stóran mun verður bundin uttanlands, við tí fyri eyga, at tryggja komandi ættarliðum eina góða, men samstundis eisini eina sunna og natúrliga tilveru í Føroyum.

Orsøkin til, at eg skrivaði hesa greinina júst tá, var, at búskaparfrøðingurin Hermann Óskarson í vikuni framman undan hevði hildið ein áhugaverdan fyrilestur her á Fiskirannsóknarstovuni um júst hetta evni. Fyrilesturin, sum varð endurgivin í Sosialinum, snúði seg um oljuvinnuna, og tann pening, sum føroyska samfelagið kann fáa burtur úr oljuni. Búskaparfrøðingurin gav til kennar, at hann var sera ivasamur um føroyska oljuævintýrið sum heild, og sjálvur fór eg at hugsa um eina røðu, ið eg sjálvur hevði hildið á fundi í flokksleiðsluni í javnaðarflokkinum nakrar mánaðar frammanundan.

Vandarnir

Í hesi røðuni vísti eg á júst teir somu vandarnar, sum búskaparfrøðingurin Hermann Óskarson vísti á í fyrilestrinum, og eg mælti til, at stórur partur av oljupeninginum verður settur í grunnar til ávís endamál, og at hesir grunnar verða bundnir uttanlands, soleiðis at oljupeningurin ikki kemur at órógva javnvágina í føroyska samfelagnum, men heldur kann tryggja eftirkomarunum eina góða og natúrliga tilveru í Føroyum. Tá eg nevni javnvágina í føroyska samfelagnum, so hugsi eg um framleiðsluskapandi og útflutningsfremjandi vinnuna øðrumegin, og almennu og privatu íløgurnar hinumegin. Við privatar íløgur hugsi eg her somuleiðis um íløgur, sum eru forbrúksfremjandi og harvið ofta eisini innflutningsfremjandi.

Gera vit onki, er stórur vandi fyri, at oljuvinnan fer at koma føroyska samfelagnum í størsta óføri, sum vit nakrantíð hava verið í. Hendan kann koma okkum aftur um brekku í ólukkumát. Ein vandi er, at peningaumfarið í føroyska samfelagnum gerast alt ov stórt, við tí úrsliti, at vit fáa eina ótálmaða nýtslu, at sethúsaprísirnir og prísirnir á byggijørð ruka upp í loft, og at vit fáa stórt hall á handilsjavnanum og gjaldsjavnanum, at tað almenna, kommunurnar og tað privata fara at gera alt ov stórar og kostnaðarmiklar íløgur, við tí úrsliti, at okkara høvuðsvinna og onnur framleiðsluskapandi og útflutningsfremjandi vinna verður løgd lamin. Tað var júst hetta, sum hendi í áttati árunum, tá almenna og privata virksemið í ikki framleiðsluskapandi og útflutningsfremjandi tiltøk varð alt ov stórt.

Stóra virksemið í áttati árunum – eg hugsi t.d. um vatnorkuutbyggingina hjá SEV, um tær stóru kommunalu íløgurnar í Tórshavnar og Klaksvíkar kommunu og um privatu íløgurnar í handilsbygningar til innflutning og økta nýtslu – førdi við sær, at fiskiskip løgu vegna manningartrot og at fiskiídnaðurin so at siga hvønn dag lýsti eftir arbeiðsfólki í útvarpinum. Skulu vit gera okkum eina mynd av oljusamfelagnum, soleiðis sum tað kann verða, um vit ikki eru á varðhaldi, so skulu vit bara leggja støðuna í áttati árunum undir eitt mikroskop.

80 árini

Eitt gamalt orðatak sigur, at brent barn ræðist eldin, so her skuldi ein trúð, at vit føroyingar høvdu tikið við læru. Tí allar avleiðingarnar, sum standast av einum alt ov stórum peningaumfari í samfelagnum kenna vit frá áttatiárunum. Og her hugsi eg serstakliga um tær avleiðingarnar, sum koma í kjalarvørrinum av einum alt ov stórum peningaumfari, ið m.a. eru hesar: Hjá summum verður talan um eina munandi lægri inntøku, enn talan var um í teimum góðu árunum, og hjá øðrum verður talan um als onga inntøku, men arbeiðsloysi og dagpening frá ALS. Av tí at landskassin fer á ørmundahús, fáa øll – bæði tey við lægru inntøkuni og tey arbeiðsleysu – hægri skatt og størri avgjøld til landskassan at stríðast við. Bæði í vinnulívinum og hjá privatfólki verður húsagangur dagligur kostur. Úrslitið verður fólkaflyting av landinum.

Tiltaksgrunnur

Tað er ikki óvanligt at seta pening í tiltaksgrunn. Fleiri føroyskar kommunur hava tiltaksgrunnar, ið tær seta pening í, sum tær skulu hava til taks, um tað av álvara kemur at leika hart á búskaparliga. Í vinnulívinum er tað heldur ikki óvanligt at seta pening í grunnar. Útgerðarfeløg, sum fáast við skiparakstur, seta pening í t.d. klassingargrunn og at seta pening í tiltaksgrunnar er eisini eitt kent fyribrigdi, tá talan er um skiparakstur og annað vinnulív. Í privata húsarhaldinum leggja fólk eisini pening til síðis, sum tey kunnu hava til at taka, um hetta gerst neyðugt.

Talan er bara um eina vanliga konsolidering. Sjálvandi skulu vit royna at konsolidera føroyska samfelagið best møguligt. Hetta eiga vit altíð at gera. Og hetta áttu vit eisini at gjørt undir heilt vanligum umstøðum. Tí er tað so sjálvsagt og natúrligt, at hetta verður gjørt í heilt stóran mun, um so verður, at føroyska samfelagið fer at fáa risastórar upphæddir burtur úr oljuvinnuni. Alt bendir á, at olja er undir Føroyum, og neyvan slepst undan, at oljan verður pumpað upp. Tann avgerandi spurningurin er, hvussu vit fara at umsita hetta oljuríkidømi.

Onnur lond

Í fyrilestrinum hjá Hermanni Óskarsyni, sum eg fyrr havi nevnt, verða tvey lond tikin sum dømir. Annað landið er eitt ræðandi dømi. Hitt landið er eitt fyrimyndarligt dømi. Londini er avíkavist Mexiko og Noreg. Spurningurin til okkara er, um vit velja ta mexikonsku loysnina, ella um vit velja ta norsku loysnina. Í Mexiko livdu tey í sus og dus so leingi oljuævintýrið vardi. Nú er so timburmenninir komnir. Tey sita eftir við teimum óhugnaligu avleiðingunum. Landið er í svárari kreppu. Í Noreg hava teir í stóran mun valt at binda oljupeningin uttanlands. Har eru og koma helst ongir timburmenn. Teir fáa neyvan nakra kreppu í kjalarvørrinum av oljuævintýrinum.

Um oljuvinnan gerst umfatandi, og kemur at fevna um eitt drúgt áramál (onkur spáar ein 60-70 ár), eru eisini aðrir og størri vandar á ferð. Tá er vandi fyri, at ongin longur dugir at veiða fisk. At ongin longur dugir at framleiða vøru til útflutnings burtur úr fiski. At vit ongi fiskiskip og ongan fiskiídnað eiga, tá oljuævintýrið er av. Føroyingar, sum hava sigit til Onglands gjøgnum árini vita, hvussu ein skotskur býur sum t.d. Aberdeen er endavendur orsakað av oljuvinnuni. Áður var hetta ein blómandi fiskivinnubýur við heilum hópi av fiskiskipum, uppboðssølum og øllum tí, sum hoyrir uppi í einum fiskivinnuumhvørvi, men í dag er alt hetta burtur.

Víðari kunnu vit nevna, at ongin longur fer at duga at arbeiða í landbúnaðinum. At ongi fjós og ongi neyt verða eftir. Heldur ikki eitt Mjólkarvirki Búnaðarmanna. Tá vit hugsa um annan ídnað enn tann, sum hevur beinleiðis við oljuvinnuna at gera, so er hann helst farin sama veg sum fiskivinnan og landbúnaðurin. Og hvat skulu vit gera við ein ídnað, sum er tengdur at oljuvinnuni, tá oljukeldurnar eru tómar? Tey, sum tá hava tann førleikan, hava bert eitt val, og tað er at flyta til okkurt annað land, har oljuvinna er. Hetta verður sum at vakna við ringum timburmonnum eftir ein øgiligan rús.

Sannleikin er tann, at avleiðingarnar av oljuvinnuni, um vit ikki binda um heilan fingur nú beinanvegin, kunnu gerast so óhugnaligar, at vit valla tora at hugsa tankan at enda.

Bera vit okkum rætt at...

Bera vit okkum hinvegin rætt at, kann oljuvinnan verða til stórt gagn, bæði fyri okkum, sum nú liva, og fyri tey komandi ættarliðini av føroyingum. Hon kann gagna føroyska samfelagnum langt inn í framtíðina. Men bera vit okkum hinvegin skeivt at, er stórur vandi fyri, at hendan vinnan sum frálíður førir okkum út í stóra neyð og armóð. Hon kann í versta føri gera enda á føroysku tjóðini. Og her eiga vit at vera á varðhaldi. Hetta er helst størsta avbjóðingin, føroysku tjóðini hevur verið fyri nakrantíð. Hetta er ein stór avbjóðing til fólkið í Føroyum – til føroysku tjóðina. Ikki minst er hetta ein avbjóðing til okkara politikarar.

Fyri at verða eitt sindur meira itøkiligur viðvíkjandi oljuinntøkunum, kann eg nevna, at eg á flokksleiðslufundinum í javnaðarflokkinum á sínum mælti til, at ávísur partur av oljuinntøkunum eigur at verða settur í ein kreppugrunn (tiltaksgrunn), sum tikið kann verða av, eftir nærri ásettum og lógfestum reglum, um so verður, at ein herviligkreppa aftur rakar føroyska samfelagið. Ein annar partur eigur at verða settur í grunn, við tí fyri eyga, at vit alla tíðina endurnýggja okkara høvuðsvinnu, t.v.s. fiskiskipaflotan og fiskiídnaðin ella matvøruídnaðin, sum vit heldur eiga at kalla hendan ídna í framtíðini, soleiðis at vit altíð vera kappingarførir við tey lond, sum vit kappast við á fiskivinnuøkinum.

Vinnulívsgrunnur

Eisini eigur peningur at verða settur í ein vinnulívsgrunn, við tí endamáli, at útbyggja alternativar vinnuvegir, og her hugsi eg um landbúnaðin, ymiskan ídna, handverk og tænastuvinnuna annars. Tað ber eisini til at seta almennan pening burtur av oljuinntøkunum í arbeiðsloysisskipanina og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (Samhaldsfasta). Men felags fyri allan hendan pening má verða, at hann í størst møguligan mun verður bundin uttanlands, og ikki verður tikin heim fyrr enn haldgóðar grundgevingar og lógarheimild eru fyri tí.

Skjótast gjørligt eigur løggávuvaldið – Føroya Løgting – at fara undir neyðugt lógarsmíð, har ásett verður, hvussu stórur partur av oljuinntøkunum eigur at verða bundin uttanlands, hvørji endamál hesin peningur skal ella kann nýtast til, nær hann kann verða tikin heim aftur o.s.fr. Í hesum arbeiði eiga vit at hava okkum fyri eyga, hvussu politisku lagsbrøður okkara í Noreg hava lagt oljuvinnuna til rættis, og í hvønn mun og til hvørji endamál teir hava bundið partar av oljuinntøkunum uttanlands.

Higartil havi eg bert umrøtt spurningin um tey árin, sum oljuvinnan og oljuinntøkurnar í longdini kunnu fara at fáa fyri føroyskt vinnulív og samfelagsbúskapin annars, men nógvir aðrir spurningar eru tengdir at hesum máli. Hetta er eisini ein tjóðskaparspurningur. Ein spurningur um okkara mentunararv. Og ein spurningur um at varðveita okkara tjóðareyðkenni. Vandi er fyri, at vit missa fótafestið og hvørva sum tjóð.

Alt í alt haldi eg kortini, at hesir báðir spurningarnir eru nær tengdir hvør at øðrum, og tað merkir, at megna vit at varðveita vinnulívsmynstrið og harvið javnvágina í samfelagnum, so koma vit eisini at yvirliva mentunarliga – vit fara tá at varðveita okkara siðaarv og okkara tjóðareyðkenni. Lat okkum í øllum førum vóna at so verður«